# Eitt stig nærri loysn

**Vónandi fáa vit nú loyst stóran ferðslu-trupulleika í Sunda Kommunu, sigur borgarstjórin**

FERÐSLUTRYGD

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landsverk og Sunda Kommunu fara nú at seta eina nevnd at fáa greiði á, hvussu til- og frákoyringarnar úr bygdunum í Sunda Kommunu, í landsvegin, skulu skipast.

Kommunan hevur leingi arbeitt fyri at fáa skil á til- og frákoyringarnar, sum verða mettar at verða sera vandamiklar, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Sunda Kommunu.

Eitt er, at til- og frákoyringarnar út á Landsvegin, eru alt ov nógvar í tali. Eitt annað er, at ongir lummar eru til bilar, sum skulu av landsvegnum og tí mugu teir standa mitt á vegnum og bíða eftir líkindum. Og tað stendst vandi av, tí nógvir bilar koyra á landsvegnum og ferðin mangan er høg.

Landsverk og Kommununa hava havt fund um málið og næsta stigið verður, at seta eina nevnd at stinga út í kortið, hvussu ferðslan skal skipast.

Endamálið er at fækkað til- og frákoyringarnar og at gera lummar til bilar, sum skulu av landsvegnum, so at teir ikki seinka ferðsluni á Landsvegnum.

- Somuleiðis vilja vit hava undirføring undir landsvegin ímillum Oyrabakka og Norðskála, so at persónbilar, sum skulu ímillum, ikki skulu hava fyri neyðini at fara upp á landsvegin, sigur Heðin Zachariasen.

- Nú vóni eg, at gongd kemur á hetta málið sum kommunustýrið hevur raðfest øgiliga høgt, leggur borgarstjórin afturat.



*Ferðsluviðurskiftini í Sunda Kommunu eru sera vandamikil og tí vil kommunan nú hava eina loysn. Og loysnin nærkast, um enn tað gongur seint*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Stívt andøvsgul upp í skrið av suðuri og útsynningi – sum frá líður av vesturi. Ælaveður, men kanska eisini sólglottar. Hitin verður um 5 stig.




**Jólini**
Andøvsgul upp í strúk í vindi av útsynningi, 8 til 13 m/s. Skíggja og ælaveður. Fríggjadagin linkar vindurin niður í gul til andøvsgul, 3 til 8 m/s. Hitin verður millum 5 og 9 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -14 |
| Nuuk | -13 |
| Qaqortoq | -12 |
| Ammassalik | -5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 6 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | -6 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | -3 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 3 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 14 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 23 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 4 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 9 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | -- |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 31 |

## LUFTTRÝSTIÐ





**Verðurlagið**
Eitt djúpt látrýsti, 965 hPa, ferðast móti Íslandi. Tilhoyrandi brúgvaløg ferðast av útsynningi móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/12 kl. 06⁰⁰ – 18/12 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,8°
Minsti hiti máldur í desember: -10,5° - Mesti hiti máldur í desember: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 7,0 mm – mált frá 17/12 kl. 06⁰⁰ – 18/12 06⁰⁰.
Avfallið higartil í desember: 131 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

12. desember Mánin næstur jørðini
19. desember Seinna kvarter
26. desember Mánin longst frá jørðini
27. desember Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. des | 3:18 | 15:40 | 2:18 | 14:40 | 2:33 | 14:55 | 5:18 | 17:40 | 6:18 | 18:40 | 1:33 | 13:55 | 0:33 | 12:55 | 3:33 | 15:55 | 4:33 | 16:55 | 3:03 | 15:25 | 4:18 | 16:40 |
| 24. des | 4:03 | 16:26 | 3:03 | 15:26 | 3:18 | 15:41 | 6:03 | 18:26 | 7:03 | 19:26 | 2:18 | 14:41 | 1:18 | 13:41 | 4:18 | 16:41 | 5:18 | 17:41 | 3:48 | 16:11 | 5:03 | 17:26 |
| 25. des | 4:50 | 17:14 | 3:50 | 16:14 | 4:05 | 16:29 | 6:50 | 19:14 | 7:50 | 20:14 | 3:05 | 15:29 | 2:05 | 14:29 | 5:05 | 17:29 | 6:05 | 18:29 | 4:35 | 16:59 | 5:50 | 18:14 |
| 26. des | 5:39 | 18:05 | 4:39 | 17:05 | 4:54 | 17:20 | 7:39 | 20:05 | 8:39 | 21:05 | 3:54 | 16:20 | 2:54 | 15:20 | 5:54 | 18:20 | 6:54 | 19:20 | 5:24 | 17:50 | 6:39 | 19:05 |
| 27. des | 6:28 | 18:51 | 5:28 | 17:51 | 5:43 | 18:06 | 8:28 | 20:51 | 9:28 | 21:51 | 4:43 | 17:06 | 3:43 | 16:06 | 6:43 | 19:06 | 7:43 | 20:06 | 6:13 | 18:36 | 7:28 | 19:51 |